LØGMANSSKRIVSTOVAN
Prime Minister´s Office

**Løgtingið**

**Svar**
**uppá**

**skrivligan fyrispurning nr. 21/2021 eftir tingskipanini § 52a til Bárð á Steig Nielsen, løgmann, frá Johan Dahl, løgtingsmanni, um digtal brotsverk og heimild til logging hjá telenet- og teletænastuveitarum**

**Fyrispurningurin var soljóðandi:**

1. Hvussu langt áleiðis er arbeiðið komið at broyta rættargangslógina við atliti til at heimila telenet- og teletænastuveitarum at logga m.a. nýtslu av IP-adressum?
2. Hvør myndugleiki arbeiðir við málinum, og nær kann væntast, at uppskot um at broyta rættargangslógina hesum viðvíkjandi verður lagt fyri Løgtingið?

**Svar:**

**Til spurning 1**
Heimildin at áleggja telefyritøkum í Føroyum at logga upplýsingar um teleferðslu finst longu í § 818 stk. 5 í nýggju rættargangslógini fyri Føroyar, sum kom í gildi 1. januar 2021.

Heimildin í § 818 stk. 5 er soljóðandi:

*"Stk. 5. Det påhviler udbydere af telenet eller teletjenester at foretage registrering og opbevaring i 1 år af oplysninger om teletrafik til brug for efterforskning og retsforfølgning af strafbare forhold. Justitsministeren kan efter forhandling med Færøernes landsstyre fastsætte nærmere regler om denne registrering og opbevaring."*

Trupulleikin, sum spyrjarin vísir á, kemst av, at heimildin í sær sjálvum ikki er nóg mikið, tí sambært somu grein er ásett, at "Justitsministeren kan efter forhandling med Færøernes Landsstyre fastsætte nærmere regler om denne registrering og opbevaring". Hendan kunngerðin, sum skal ásetta nærri reglur um skráseting og goymslu av teleupplýsingum (logningsbekendtgørelsen) er enn ikki gjørd. Hendan kunngerðin er ein fyritreyt fyri, at logningsskyldan kann setast í verk í Føroyum.

Danska løgmálaráðið hevur í fleiri ár arbeitt við at endurskoða sínar logningsreglur í rættargangslógini orsakað av, at fleiri ES-dómar hava staðfest, at donsku logningsreglurnar vóru ov víðfevndar í mun til ES-rættin. Hesi óvissu viðurskifti viðvíkjandi donsku logningini hevur gjørt, at løgmálaráðið hevur verið afturhaldandi við at seta logningskunngerðina í gildi fyri Føroyar, fyrrenn hesi viðurskifti vóru greidd.

Donsku logningsreglurnar vóru broyttar fyrr í vár, og ætlandi skal enn ein broyting gerast í donsku lógini fyri at fáa reglurnar í samsvar við ES-rættin. Av tí at Føroyar ikki eru limir í ES, er tað ikki ein treyt, at logningskunngerðin fyri Føroyar skal vera í samsvari við ES-rætt.

**Til spurning 2**

Talan er um rættarreglur á felagsøki, og tí er tað danska løgmálaráðið, sum hevur ábyrgdina av at gera neyðugu kunngerðina. Landsstýrið hevur boðað løgmálaráðnum frá, at landsstýrið vil hava logningsskyldu setta í verk í Føroyum.

Danska løgmálaráðið hevur upplýst, at ráðið arbeiðir við eini dagføring av rættargangslógini fyri Føroyar, her í millum møguliga broyting av logningsreglunum. Uppskotið skal vera liðugt í hesum árinum.

Løgmálaráðið fer í hesum sambandi at umrøða eina logningsskipan fyri Føroyar við landsstýrið og m.a. Føroya Politi, fyri at taka støðu til, um tað í sambandi við dagføring av rættargangslógini er neyðugt at broyta logningsreglurnar í § 818, stk. 5.

Ætlanin er, at uppskot til broyting í rættargangslógini fyri Føroyar skal leggjast fyri Løgtingið í hesi tingsetuni.

Í Tinganesi, 6. september 2022

Bárður á Steig Nielsen
løgmaður